# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## HALDA DANSIDAG

Í gjár og í dag verður altjóða dansidagurin hildin í Føroyum, og í kvøld endar tiltakið við eini dansisýning í Norðurlandahúsinum. Tá fara eitt nú Jóna Kristin Thomsen, Hóps, dansarar úr Tornarósu og onnur at hava framførslur.

**DANSISÝNING Í NORÐURLANDAHÚSINUM**
Hóskvøldið 29/4 kl. 19.30



## BÓKAÚTSØLAN ENDAR

Leygardagin endar stóra føroyska bókaútsølan. Nógvar bøkur eru settar til sølu við stórum avsláttri – bæði nýggjari og eldri bøkur. Tað ber til at keypa føroyskar skaldsøgur, stuttsøgusavn, yrkingasøvn, fakbókmentir, barnabøkur og aðrar bøkur. Tað er ovmikið at leita eftir í bókarúgvuni. Bókasølan er á ymiskum støðum kring landið.

**BÓKAÚTSØLAN ENDAR**
Leygardagin 1/5



## DAGURIN HJÁ ARBEIÐARUNUM

Leygardagurin er altjóða arbeiðaradagur. Og eisini í Føroyum verður 1. mai at hildin við røðum og sangi. Amerikanskir arbeiðara vóru í 1886 teir fyrstu til at gera 1. mai til afturvendandi dag hjá arbeiðsfólki, og hesin siður fór um allan heim.

**ALTJÓÐA ARBEIÐARADAGUR**
Leygardagin 1/5



## EINSAMALLUR KIM LARSEN

Mánadagin kemur nýggj fløga frá danska tónleikaranum Kim Larsen. Hesaferð er Kim Larsen rættiliga einsamallur í upptøkuhølunum, tí eingin bókur er afturat honum. Sangirnir á útgávuni eru alt frá háskúlasangum og barnasangum til blues og meira rockkendar sangir. Poul Bruun hevur framleitt fløguna saman við Kim Larsen.

**KIM LARSEN**
Mine Damer og Herrer
EMI Music mánadagin 3/5



## MENTALISTURIN

Patrick Jane kann meira enn tey flestu við sínum tankum og sínari atferð. Eftir at kona og føttir hansara verða dripin, velir hann at brúka síni yvirnatúrligu evni til at fanga drápsmannin. Patrick Jane hjálpir einum løgregluliðið at uppklára trupul mál, men allatíðina er stóra málið hjá honum at finna mannin, sum gjørdi av við hansara familju. Fyrsta sesong av sjónvarpsrøðini The Mentalist er nú komin á dvd.

**THE MENTALIST (1. SESONG)**
dvd-pakki



## SEEBACH VITJAR HVONN LIVE

Rasmus Seebach er ein tann populerasti tónleikarin í Danmark í løtuni. Eftir gjøgnumbrotið í fjør hevur hann selt fleiri fløgur enn nakar annar í Danmark, og hann hevur havt fleiri hitt. Eisini í Føroyum hava sangir sum Engel, Glad Igen, Den Jeg Er og nú Lidt I Fem verið nógv at hoyrt. Rasmus Seebach vitjar í Føroyum næsta vikuskiftið. Hann verður gestur í Hvonn Live, har hann eisini spælir onkran sang live, og seinni sama kvøld spælir hann á Rex í Havn.

**RASMUS SEEBACH**
Hvonn Live á Rás2
Fríggjakvøldið 7/5 kl. 20.00

## LIVERPOOL SKAL HJÁLPA UNITED

Tað finnast neyvan størri fótbóltsfíggindar í Onglandi enn Manchester United og Liverpool. Tey bæði mest vinnandi liðini hjálpa treyðugt hvørjum øðrum, men sunnudagin vóna United viðhaldsfólk, at tey fáa eina hjálpandi hond frá Liverpool. Chelsea, sum er eitt stig frammanfyri United, skal spæla ímóti Liverpool, og kann Liverpool taka stig frá Chelsea, kann United smíkja seg fram á fremsta plássið aftur.

**LIVERPOOL-CHELSEA**
Premier League
Sunnudagin 2/5 kl. 13.30